# Størri pápakvota í barsilsskipan

Pápakvotan, sum er tvær vikur, verður longd uppí fimm vikur, og fýra vikur verða lagdar aftrat teimum 10, sum foreldrini kunnu býta ímillum sín. Pápakvotan skal ikki verða tikin fyrstu 14 vikurnar eftir barnsburð, men fyrstu 33 vikurnar. Er ein mamma einsamøll um barnið, fær hon pápakvotuna uppá fimm vikur, og er pápin einsamallur, so hevur hann rætt til tær 14 fyrstu vikurnar, skrivar heimasíðan hjá Javnstøðunevndini. Samstundis verður hámarksútgjaldið hækkað úr 25.000, upp í 27.000 kr. Endaligu roknskapartølini fyri barsilsskipanina eru ikki tøk fyri 2007, men í 2006 vórðu 70 milliónir kr. goldnar í barsilspengum.



# Umstríddur leiðari sagt seg úr starvi

Leiðarin á bústovninum á Mýruni hevur sagt seg úr starvi. Sambært útvarpinum hjá Kringvarpinum vilja hvørki leiðarin sjálvur ella stjórin í Nærverkinum, Mary í Garði, vátta ella avsanna tíðindini. Men útvarpið hjá Kringvarpinum sigur seg vita tað frá fleiri keldum. Leiðarin varð fluttur í annað leiðandi starv á einum bústovni í Sørvági, meðan løgreglan framvegis kannar, um hann skal ákærast fyri ein tilburð av harðskapi móti einum búfólki á Mýruni, sum hann er meldaður fyri. Nærvarpið kannar eisini málið, tá eitt búfólk breyt mjødnina. Harumframt er Pedagogfelagið, millum annað við einari kæru móti Nærverkinum til Umboðsmannin, tí felagið metir, at Nærverkið hevur drálað í málinum.



*Bogi Hansen*



*Elias Davidsen*



*Al Gore*

*"Vit føroyingar hava alla grund til at vera errin saman við Boga yvir tann heiður, sum bæði hann og eisini samstarvsfelagar hansara á Fiskirannsóknarstovuni njóta í hesum døgum. Tá ið gleðirúsurin er hasaður av, kunnu vit kanska eisini við skili umhugsa nøkur viðurskifti."*

*"Ein av "perlunum" í filminum hjá Al Gore er, tá ið hann nevnir trupulleikan í sambandi við ozon-lagið. Tað ber mannaættini til at taka tøk í felag. Longu nú, nøkur fá ár eftir at hesin trupulleikin at kalla er loystur, hugsa vit neyvan um tey tiltøk, sum gjørd eru. Hetta hóast mangar spádómar um at tað ikki bar búskaparliga skynsamt til."*

taka tøk í felag. Longu nú, nøkur fá ár eftir at hesin trupulleikin at kalla er loystur, hugsa vit neyvan um tey tiltøk, sum gjørd eru. Hetta hóast mangar spádómar um at tað ikki bar búskaparliga skynsamt til.

Filmurin hjá Al Gore er ein politiskur filmur. Ein politikari hevur gjørt filmin. Hann hevur gjørt filmin við tí endamáli at geva sítt íkast til eina broytta atferð millum manna, og hann ger hetta við at venda sær til okkum – tann einstaka okkara. Til okkara, sum hava eitt persónligt íkast til umhvørvisligu atferð mannaættarinnar og til okkara, sum hava eina ikki minni týðandi atkvøðu, sum er við til at geva politiskum valevnum atgongd til maktina ella er við til at forða politiskum valevnum atgongd til maktina.

Eg vil mæla fólki til at síggja filmin, um høvið býðst.

Sannleiki ella partur av einum meira fjølbroyttum veruleika?

Fáur – fyri ikki at siga eingin – granskari innan umhvørvisøkið er ósamdur um, at CO2 innihaldið í atmosferuni hækkar. Fáir granskarar – fyri ikki at siga eingin – eru heldur ósamdir um, at meðalhitin á jørðini hækkar. Flestu granskarar eru í dag á einum máli um, at týðandi samanhangur er millum CO2 innihaldið í atmosferuni og miðalhitan á jørðini. Men sambært m.ø. dananum Henrik Svensmark og øðrum, er ikki víst, at CO2 innihaldið í atmosferuni er einasta frágreiðing til heitara veðrið. Summir granskarar hava "gingið Roma ímóti" og hava framsett eina aðra hypotesu, sum sigur, at sólblettar hava týðandi ávirkan á hitan á jørðini. Í eini grein í 1996 og fyrilestri á lærda háskúlanum í Birmingham vístu Eigil Friis-Christensen og Henrik Svensmark á samanhangin millum sólblettar og hitan á jørðini. Nú fyri stuttum hevur Henrik Svensmark saman við øðrum víst á fysiskar orsøkir til ein slíkan samanhang.

Nigel Calder hevur skrivað bókina "Den maniske sol", 1997. Í henni greiðir hann frá, hvussu trupult tað kann vera í granskingarhøpi at leggja fram gransking, sum ikki beinleiðis styðjar hypotesuni um, at vakstrarhúsárinið er tann mest týðandi orsøkin til økta hitan á jørðini. Filmurin hjá Al Gore og hendan bókin geva eina fatan av, hvussu trupult tað er hjá okkum vanligu borgarum at taka støðu í einum so fløktum máli.

Men støðu taka vit, um vit vilja tað ella ikki. At onkur heldur, at tað er umhvørvismálinum at frama at halda mótstríðandi gransking burtur, broytir ikki tann veruleika, at vakstrarhúsárinið er menniskjaskapt og ávirkar hitan á jørðini. Mótstríðandi gransking gevur eitt gott íkast til onnur viðurskifti, sum eisini hava týdning – tað er jú ikki soleiðis, at Svensmark og aðrir pástanda, at vakstrarhúsárinið ikki er ein partur av málinum.



### Professari og heiðraður

Tað vóru teir báðir, Elias Davidsen, sáli, og Bogi Hansen, sum í sjeytiárunum løgdu lunnar undir eini skipaðari menning av føroyska íkastinum til havfrøðina, veðurfrøðina og vatnfrøðina. Elias fór so ungur og tann dagin í dag – gott 10 ár eftir – verður tikið til saknin eftir hann. Boga untist fleiri ár og hevur hann hildið kós og ferð. Hann hevur hildið seg til tann mátistokkin, sum mangan verður sleptur longu í ungum árum. Ein mátistokkur, sum stundum verður nevndur idealisma og til aðrar tíðir góður vísindaligur siður ella bert vanligt skil.

Vit føroyingar hava alla grund til at vera errin saman við Boga yvir tann heiður, sum bæði hann og eisini samstarvsfelagar hansara á Fiskirannsóknarstovuni njóta í hesum døgum. Tá ið gleðirúsurin er hasaður av, kunnu vit kanska eisini við skili umhugsa nøkur viðurskifti.

Tí júst royndirnar hjá Boga siga okkum nakað um, hvørjar leiðir eru gongdar. Tær geva eisini eina ábending um, hvørjar leiðir eru ógongdar. Granskingarkorini hjá Boga hava ikki verið tey bestu. Sjálvur hevur hann tikið at kalla øll tøkini tey fyrstu mongu árini. Ein máting her, ein máting har, ein analysa, ein ritgerð. Við at leggja stein oman á stein varð fyrst eitt støði bygt upp og síðani lagt eitt fundament á hetta støði og endiliga – eina ferð seinast í 80-unum og inn í 90-árini - sóust úrslitini í havsbrúnni. Tey fyrstu phd-lesandi vóru sett við og komu undan.

Eitt serligt úrslit er júst heiðurslønin til Boga sjálvan. Eitt annað úrslit, sum ikki hevur verið størvegis umrøtt, var tá ið Hjálmar Hátún, sum hevur fullført ein phd-lestur við vegleiðing frá Boga, saman við Boga og øðrum, fekk eina grein prentaða í tíðarritinum "Science". Hvussu stóra virðing slík grein gevur millum granskarar, fingu vit eina fatan av í danska sjónvarpinum DR2, Deadline, fyri tíð síðani, har víst var til eina bretska kanning, sum vísti tað øvugta sum úrslitini hjá Hjálmari. Danski granskarin vísti til greinina í Science og vísti á, at hesi úrslitini vóru betur eftirfarandi enn tey bretsku.

### Nakrir veruleikar, sum mangan verður roynt at skáka sær undan

Vit kunnu taka samanum:

Vísindin roynir at loysa gátur um hita, vakstrarhúsárin, sólblettar, orkukeldur, orkuberar o.a., men uttan mun til stórar óvissur er veruleikin tann, at mannaættin í dag er so stór og brúkar so nógva orku, at hon máar undan sjálvum lívsgrundarlagnum á jørðini.

Tað ber til at venda gongdini, um tøk verða tikin í felag og mannaættin í síni heild broytir atferð – við teim ríkastu og mest orkukrevjandi tjóðunum á odda.

Millum teirra, sum ganga fremst í granskingini hesum viðvíkjandi, eru nakrir føroyingar við Boga Hansen á odda.

Tað hevur borið til hjá færri enn 50.000 borgarum úti í Atlantshavi at fáa slíka gransking til høldar við tað, at samfelagið og nakrir persónar settu sær høg mál og fingu fleiri við sær, og við tað at hesi fingu rímiligan arbeiðsfrið í eini 30 ár – ja, 30 ár!

Úrslitini, sum liggja eftir Boga, Elias Davidsen, sála, starvsfólki á Fiskirannsóknarstovuni og starvsfólki aðrastaðni, hava ikki einans granskingarvirði, men eru eisini eitt av heilt fáum framtøkum, sum á føroyskum grundvølli hava møguleika at vera støði undir nýggjum vinnuligum átøkum.

Um illa vil til, skal ikki meira enn ein óheppin avgerð á hægsta stigi til fyri at hesir møguleikar gleppa okkum av hondum.

Tað er vert at hava í huga, hvussu nógv arbeiði skal leggjast í, tá ið málini verða høgt sett, og hvussu lítið skal til fyri at ein heil perlurekkja verður kvett av og einki úrslit fæst til høldar – vit hava havt útreiðslurnar og stríðið, men áðrenn fruktirnar kunnu heystast og fáast til høldar fóru vit undir eitthvørt annað.

Kann vera, at Føroyar eru heimsins mest dálkandi tjóð – eg eri enn ikki sannførdur um hetta av teirri orsøk, at okkara tøl innrokna mær vitandi skipaflotan, har aðrar tjóðir ikki gera tað. At okkara skipafloti í stóran mun er fiskifloti ger ikki hendan spurningin minni fløktan. Men uttan mun til praktiskar skilmarkanir av ymsum slagi haldi eg, at vit áttu at sett tey mest týðandi umhvørvismálini hægri á dagsskránna – serliga tey, sum viðvíkja orku og útláti av vakstrarhúsgassum. Eg ivist lítið í, at tað vil gagna tjóðini á so mangan hátt, samstundis sum vit í verki vísa, at vit vilja vera partur av heimssamfelagnum.